# Sjúkrabilurin steðgaði upp á veg eftir yvirkoyrdum dreingi

*Ein sjúkrabilur í Klaksvík breyt ein aksil, tá hann var á veg til eitt ferðsluóhapp týsdagin. Hin sjúkrabilurin var á verkstaði, og tí mátti ein 14 ára gamal drongur flytast á sjúkrahúsið í persónbili*



*So kláraði sjúkrabilurin ikki meira. Hann breyt aksilin einar hundrað metrar frá ólukkustaðnum, har ein 14 ára gamal drongur varð yvirkoyrdur*

EYÐUN KLAKSTEIN

Týsdagin var eitt ferðsluóhapp í Klaksvík. Sjúkrabilur varð boðsendur eftir einum 14 ára gomlum drongi, sum varð yvirkoyrdur, men bilurin kom ongantíð vegin fram.

Undir neyðsendarkoyringini breyt sjúkrabilurin aksilin og slapp ikki av staðnum. Hin sjúkrabilurin, sum er knýttur at Klaksvíkar Sjúkrahúsi, var á verkstaði.

Hann var í skundi boðsendur á ólukkustaðið, men áðrenn hann kom vegin fram, var drongurin fluttur á skaðastovuna í persónbili.

Drongurin var á rulliskoytum, tá hann varð ákoyrdur av einum bili við Mylnutún. Tann 14 ára gamli breyt armin og fekk aðrar smærri snuddir, tá hann eftir samanbrestin við bilin varð slongdur tríggjar metrar eftir vegnum.

Vit hava skilt á lagnum, at skaðin ikki var álvarsligur, og at drongurin hevur tað gott.

**Gamlir og slitnir**

Klaksvíkar Sjúkrahús hevur tveir sjúkrabilar, men báðir eru gamlir og slitnir.

Bilurin, sum breyt aksilin undir neyðsendarkoyringini týsdagin, hevur koyrt yvir 400.000 kilometrar.

Hin bilurin, sum varð á verkstaði týsdagin, verður settur hálvan mai, um hann ikki verður gjørdur í stand áðrenn tað.

Í gjár var ongin sjúkrabilur í Klaksvík. Tann, sum breyt aksilin, er settur, meðan hin sjúkrabilurin var av oynni í sjúkraørindum. Tað er púra vanligt, at sjúkrabilarnir í Klaksvík eru av oynni, tá sjúklingar skulu flytast.

Um ein ólukka hendi í norðoyggjum í gjár, stóð ein Mazda-vøruvongur klárur at fara avstað. Í vøruvogninum er nakað av útgerð og ein børa, men hann er als ikki egnaður til sjúkraflutning og verður bert nýttur av neyð.



*Sjúkrabilurin skuldi flyta ein skaddan drong á sjúkrahúsið, men mátti ístaðin sjálvur sleipast heimaftur*

**Fáa ein nýggjan bil**

Heri Ellingsgaard, stjóri á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, sigur, at sjúkrahúsið fær ein nýggjan sjúkrabil innan stutta tíð, og ætlanin er at umvæla annan av teimum gomlu bilunum, so hann verður í góðum standi.

Hetta heldur hann fer at bøta munandi um støðuna við sjúkraflutninginum í norðoyggjum.

Vit hava tó skilt á lagnum, at støðan við sjúkrabilunum í Klaksvík er álvarsom, og at trupulleikarnir ikki til fulnar verður loystir við einum nýggjum bili.

Hendingin týsdagin hevði ongar álvarsamar fylgjur við sær, men støðan kundi verið ein onnur, um talan var um eitt størri óhapp.

# Venjing norðanfyri

EDVARD JOENSEN

Tjaldrið og Ægir leitaðu eftir einum gummibáti á Íslandsrygginum mánadagin. Talan var um eina venjing, sum gekk væl, sigur Elmar Højgaard, leiðari á Vaktar- og Bjargingartænastuni.

Í grundini var tað Tjaldrið, sum leitaði. Uppgávan hjá Ægi var at sleppa einum gummibáti, sum so sendi signal, sum Tjaldrið hoyrdi og fór at leita eftir, sigur Elmar Højgaard.

Tá Ægir hevði slept bátinum, rýmdi hann frá honum, og nakrar tímar seinni fór signalið so í gongd. Hetta hoyrdu teir umborð á Tjaldrinum og fóru at leita. Teinurin at sigla var eitt sindur drúgvur, men tá teir vóru komnir á leiðina, haðani signalið kom, gekk tað rímiliga skjótt, at finna bátin.

Eftir venjingina, sum var á Íslandsrygginum nær íslendska markinum, kom Ægir ein túr til Havnar, líkasum fyri at siga góðan dag, nú hann var í farvatninum kortini, sum Elmar Højgaard tekur til.

Hetta, at vaktarskip vitja grannarnar, er ikki heilt ókent, og onkur íslendingur hevur verið her áður. Eisini onnur fremmand skip av hesum slagnum hava vitjað í Føroyum. Elmar Højgaard sigur, at Vaktar- og Bjargingartænastan hevur ikki gjørt nógv av at lata okkara skip vitja uttanlands, men danska sjóverjan ger tað soleiðis av og á.

Annars eru hesar venjingarnar regluliga hvørt ár. Ein norðanfyri, og ein sunnan fyri Føroyar. Luttakararnir eru vanliga úr Íslandi, Noreg, Skotlandi og Føroyum. Hesaferð vóru bara íslendingar og føroyingar við, sigur Elmar Højgaard. Men um ikki so langa tíð verður ein venjing sunnan fyri eisini, og tá fara hinir at luttaka. Íslendingar verða ikki við tá.

Tað er ein bólkur, sum samskipar hesar venjingarnar, sigur Elmar Højgaard.



*Íslendska vaktarskipið Ægir hevur verið við í bjargingarvenjing í føroyskum sjógvi. Mynd: Jens Kristian Vang*

Og tey, sum við eru, vita ikki nær tær vera, fyrr enn alarmurin fer í gongd.

Hesar venjingarnar eru sera umráðandi fyri at royna ta útgerð, sum bara skal rigga, tá veruligt brúk verður fyri henni.

Annars gongur tað eftir ætlan við nýggja vaktarskipinum, sum smíðað verður í Noreg. Tað skal eftir ætlan koma til Føroya 2. oktober í ár, sigur Elmar Højgaard, leiðari á Vaktar- og Bjargingartænastuni.



Út at ferðast við bili í summar?

TRYGD Bilhjálp



petur & petur • 320870

Manãna bilas caputo con Trygd no problemas

Tað er ikki altíð so stuttligt at standa uppsteðgaður uttanlands. Hvar fái eg hjálp, hvat kostar tað, og dugi eg at siga tað...?

Við **Trygd Bilhjálp** er "no problemas" - ring, og vit koma við hjálp.

**Trygd Bilhjálp** er eitt ískoyti til skrokktryggingina og fevnir m.a. um útreiðslur til starthjálp, veghjálp, kranabil og mekaniska hjálp á staðnum í sambandi við óhapp, motorsteðg ella líknandi.

Við **Trygd Bilhjálp** fært tú ókeypis hjálp nærum um alt Europa, tí Trygd samstarvar við Falck í Danmark.

Er títt tørn komið til at verða óheppin, skalt tú bert ringja til Falck, og tú fært hjálp.

**Trygd Bilhjálp** kostar einans 350,- kr. um árið, tá ið bilurin er yngri enn 6 ár, og 450,- kr. um árið, er hann eldri.

Um tú ikki longu hevur tryggjað bil tín hjá Trygd, so eru nú enn fleiri orsøkir til at gera tað.

Kom inn í eina av deildunum hjá Føroya Banka ella til Trygd og fá tær **Trygd Bilhjálp** - tað fer at loysa seg.

*...tí Trygd Bilhjálp fevnir eisini um Europa*

TRYGD

Tórsgøta 16 Postboks 44 110 Tórshavn Tel 31 16 77 Fax 31 72 11